*Fylgiskjal 15*

the Faroe Islands
Unspoiled, Unexplored, Unbelievable

*Tórshavn 28.05.2018*

**Hoyringssvar frá Visit Faroe Islands til náttúrumargfeldislógina**

*Yvirskipaðar viðmerkingar*
Tá tað snýr seg um náttúruvernd er ongin loyna, at vit í Føroyum eru eftirbátur. Nýggj náttúruverndarlóggáva hevur verið ávegis í nógv ár og tað er sera jaligt at uppskot til nýggja náttúrumargfeldislóg loksins er sent til ummælis. Lóggáva á økinum er sera átrokandi og heilt avgerandi, vilja vit eina væl skipaða og burðardygga ferðavinnu.

Talan er um eitt rættiliga stórætlað (ambitiøst) lógaruppskot, har náttúruvernd verður handhevjað øðrvísi enn tað vit eru von við. Lógin er ein sonevnd heimildarlóggáva ella rammulóggávu, sum ikki kann standa einsamøll. Lógin inniheldur við øðrum orðum nógvar kunngerðarheimildir ið skulu útfyllast, áðrenn lógin veruliga kann fáa virknað eins og tørvur er á stórum kortleggingararbeiði, ið er neyðugt at fremja, skal hendan lógin fáa ynskta virknaðin.

Hetta merkir, at lógin fer at krevja lutfalsliga nógv av eini nýggjari umsiting. Í almennu viðmerkingunum verður tó sagt, at tað ikki ber til at siga ágreiniliga, hvørjar avleiðingar uppskotið fer at hava fyrisitingarliga og fíggjarliga. Sagt verður at talan er um ein amboðskassa, har tað veldst um politiska raðfesting, hvussu og hvussu nógv lógin verður brúkt. Eisini verður sagt at tað illani ber til at meta um, hvussu nógv starvsfólk neyðugt er at seta í starv, fyri at umsita lógina á nøktandi hátt.

Hetta halda vit vera ein veikleiki við uppskotinum: at tað er so ógreitt, hvørjar avleiðingar uppskotið hevur, og at uppskotið harvið ikki gevur politisku skipanini eitt nøktandi avgerðargrundarlag. Almennu viðmerkingarnar áttu at verið útbygdar við fleiri metingum um, hvat ein nøktandi náttúrufyrisiting krevur. Inniheldur lógaruppskotið ikki slíkar ítøkiligar metingar, er vandi fyri at nýggja náttúrufyrisitingin ikki fær nøktandi fígging, og at arbeiði við náttúruvernd í Føroyum av tí sama verður meiri avmarkað.
Í hesum sambandi skal eisini havast í huga, at Føroyar eru eftirbátur og at stórt arbeiði liggur á láni, ikki minst arbeiði at skráseta náttúruna, ið er drúgt men neyðugt arbeiði, tá verndarátøk skulu setast í verk.

*Økisvernd*
Fyri ferðavinnuna er tað serliga kapittul 5 í lógini ið snýr seg um økisvernd, ið er viðkomandi. Ásetingarnar geva landsstýrismanninum heimild til í kunngerð at skipa ymisk sløg av verndarøkjum, bæði á landi og á sjógvi. Lógaruppskotið letur t.d. upp fyri, at stór náttúruøki kunnu verjast sum tjóðgarðar, eins og til ber at útnevna landslagsverndarøki, har tað er landslagið sum heild ið verður vart. Eisini ber til at verja øki við sjáldsamari ella viðkvæmari náttúru, serligum jarðfrøðiligum fyribrigdum ella á annan hátt einum týðandi náttúruvirði.

Vit meta samanumtikið, at ásetingarnar um økisvernd er eitt gott og neyðugt amboð, sum fer at vera ein ágóði fyri Føroyar sum ferðafólkaland, verða ásetingarnar nýttar skynsamt. Verður eitt øki í Føroyum til dømis útnevnt sum tjóðgarður, verður hetta væntandi bara enn ein orsøk at vitja Føroyar.

the Faroe Islands
Unspoiled, Unexplored, Unbelievable

Um sæð verður burtur frá sjálvsagda virðinum í at verja náttúru og djór, er tað eisini eitt virði fyri eina vaksandi ferðavinnu, at fleiri støð í Føroyum verða útnevnd sum serlig verndarøki, tað veri seg orsaka av serligum landslagi, jarðfrøði ella djóra- ella plantusløgum. Hetta er við til at fjøltátta og spjaða ferðavinnuna og kann hava við sær nýggjar inntøkur, beinleiðis og óbeinleiðis, samstundis sum hetta ásetir neyðugu avmarkingarnar fyri at varðveita serliga virði við økinum.

Tað hevur víst seg at vera ein stór avbjóðing at seta í verk nøktandi verndartiltøk og avmarkingar á serliga sárbærum økjum við støði í galdandi lóggávu. Leiðin út í Mykineshólm og lundalandið í Lamba verður ofta tikið fram sum dømi. Við nýggju ásetingunum um serlig verndarøki, ber til at seta inn við serligum verndarátøkum, sum bæði kunnu verja fuglin og náttúruna, men sum eisini kunnu vera við til at skipa ferðavinnuna betri. Hetta eru viðurskifti sum væl kunnu ganga hond í hond.

Áðrenn eitt verndarøki kann verða útnevnt, krevst gjølligt fyrireikingararbeiði, so tað verður tryggjað, at verndarátøkini eru tey røttu. Taka vit aftur Mykines sum dømi, kann væntast at eitt lutfalsliga stórt kanningararbeiði skal gerast, t.d. stovnsmetingar og árinskanningar av lendingum, áðrenn til ber at meta um, hvørji verndartiltøk skulu ásetast í kunngerð. Hetta krevur ivaleyst at fleiri ymiskir fakbólkar samstarva um at kanna økið nøktandi. Síðani krevst at kanningararbeiði verður umsett til ítøkiligar kunngerðarásetingar. Til samans kann roknast við, at stórt og tíðarkrevjandi arbeiði krevst, um eitt øki t.d. skal útnevnast sum tjóðgarður.

Verður nýggja náttúruverndarfyrisitingin ikki raðfest við eini nøktandi fígging, er vandin at at tað eru lang útlit til at slík verdarøki verða veruleiki. Enn einaferð mugu vit tískil leggja áherðslu á, at nøktandi fígging og ein fakliga sterk fyrisiting er altavgerandi, skal lógin veruliga verða eitt amboð til at fremja munagóða náttúruvernd og eitt amboð til at tryggja eina burðardygga ferðavinnu sum frá líður.

*Niðurstøða*
Lógaruppskotið inniheldur fleiri heimildir og góð verndaramboð til gangs fyri føroysku náttúruna og harvið eisini ferðavinnuna. Lóggávan er heilt greitt eitt stig á røttu leiðini og tí taka vit undir við uppskotinum.
Tó skal eisini gerast vart við, at tørvur er á fleiri átøkum, áðrenn til ber at siga, at vit eru komin á mál. Millum annað er stórur tørvur á lendislóggávu og dagførdari jarðarlóggávu ið skipar ferðsluna í haganum. Hetta er grundleggjandi, vilja vit eina væl skipaða ferðavinnu í Føroyum. Vónin er tí, at hetta bara er fyrsti liður í eini størri tilgongd at skipa náttúruumsiting, lendisnýtslu og jarðarlóggávu betri.

Vinaliga

Guðrið Højgaard, stjóri

Visit Faroe Islands • Gongin 9 • Postsmoga 118 • FO-110 Tórshavn
Tel. 555 666 • www.visitfaroeislands.com • info@visitfaroeislands.com